Ein eydnuríkur "Gráur morgun" 4. des.

FRITS JOHANNESEN

Kring staðin, Fuglafjørð, eru háborin fjøll, sum lata ljós av sær í ymsum skiftum. Onkuntíð er ljósið skært og viðkvæmt, onkuntíð er tað reyðbrúnt og illlitt, við hvørt mosagrønt, grátt og klettasvart, og ikki so sjáldan er tað okkur gult og svart við hvítum rípum eftir himnahválvinum. Ja, vit kunnu blíva við at reksa hesar ramsurnar upp um ljósið, sum dettur úr skýgloprum niður og legst á fjallasíðurnar, líðirnar, hamrar, urðar og fjarðarvatnið. Hetta lýsið kastar av sær til tín og mín at skoða.

4. desembur

Hendan dagin, ið her verður sipað til, 4. des. í ár, var ein gráur morgun og ein gráur dagur. Tað kann tykjast sera vónleyst at fara útum ein slíkan morgun, hyggja upp eftir fjallasíðuni og bert hóma grá ílegur í natúrini. Ja, onkuntíð verður tikið til, at har var bara grátt útyvir grátt. Tað er troystarleyst at hoyra slík orð, og vit vóna, at tað skjótt fer at lýsa í, so tað gráa ljósið fer sína kós - í eina vørðslu at leggja seg. Men tað mennir seg skjótt aftur til næstu løtu at koma undan aftur væðingini og leggja sín gráa bul yvir deytt og livandi. Hendan gráa morgun setti eg mær fyri at fara til Havnar at vita, hvat rørdi seg innan fyri Tórgarð, at vita um gráin, sum hekk út yvir Borgina, mundi hava tikið hendur saman um Nólsoynna hendan morgun.

Strendur

Setti meg í bilin og fór av stað. Fór at hugsa, um eitt árið eg var úti á Strondum eini smáørindi og fall í prát við ein stranding, Dia Rasmussen, sála, sum eg kendi. Tá ið við vit hittust, segði hann, at tað var so vorðið doðavegur í morgun. Hetta var á fyrsta sinni, eg hoyrdi hetta orðið gitið. Hetta var eitt gott orð, og kundi ein ætlað um, at orðið sjálvt bar tað ljóðið við sær, at tað tulkaði júst løtuna, sum var. Orðið merkir: ráligt og támut veður. Alt kring teg var vátt, grátt og rátt. Skálafjørðurin silpaði í hesum gráliga, káma ljósi, og alt fór í rangastrúpan av tí fáliga ljósi, sum var um fjørðin.

Fert tú út um Syðrugøtueiðið, liggur Skálafjørðurin sum ein vøgga fyri tær. Barn, sum liggur og pliar í vøgguni, sær ljós á hvøjum fingri, og soleiðis kanst tú síggja fjørðin t. d. tíðliga onkun morgun, tá sólin hevur fingið fastatøkur á fjarðarvatninum uttast við. Smátt ljós skyggir við fjarðarmunnan og floytir sær á smáum aldum slíkan morgun. Tað er munur á og so at hava veðurgrátt um teg allastaðni. Soleiðis er hetta landið, sum goymir at so nógvum ljósi, at tað er torført at seta orð á, men grátt...

Oyndarfjørður

Hendan sama dag, sum her verður hugsað um, varð farið um somu leið til Oyndarfjarðar, og fall eg í prát við ein oyndfirðing – Petur í Móuritsarstovu, sála. Hann segði millum annað, at tað var so lagligt í morgun. Ja, hvat skuldi eg siga? Eg var farin undan doðaveðrinum á Skálafjørðinum og komin í lagligt veður, sum merkir, stilli við ongum vindi; men támut var veðrið, men heldur turrari í Oyndarfirði enn á Skálafjørðinum, men tað gráa var eftir tær, hvønn veg tú so vendi tær. Hetta var á hásumri, so tann grøni – og havblái liturin skuldu vunnið á tí køvandi, gráa andanum, sum tutlaði sítt lag um garðlið og húsarhorn, men soleiðis var ikki. Fyri at koma burtur úr hesum køvandi, lagliga doðaveðri, fór eg inn til Miu mostur í Ansastovu at fáa mær ein morgunduss. Her var títt upphav í móðurlegg, og stóð Mia mostir ljóslivandi við slagborðið og segði: " Tú ert ikki neyðsendur í morgun, tú brosar so!" Tað var, eins og alt loysnaði upp fyri tær hendan gráa morgun. Bara hoyra Miu tala, var ein opinbering. Tú vart frelstur undan tí grábeinta ljósinum, sum nú lá í andaleypi á trappusteininum.

Sundalagið og Nólsoyggin

Hendan dag, 4. des. í ár, vart tú ikki á veg út á Strendur ella til Oyndarfjarðar, men til Havnar. Sundalagið toygdi seg upp um songarstokkin henda lagliga morgun, og rekkjuváðin hekk út yvir Hagagjógv og Veðranes. Tann grái helluflótturin oman fyri Hagagjógv var so sveittakendur í doðaveðrinum, at rekkjuvágin var so dýggj vát av náttarvætuni, og hvør klettur og hella skygdu stálgrá í morgunljósinum. Steinflatan var gráari enn grá, so grá, at tað var næstan eingin gráur litur eftir, so myrkagrá var hon. Soleiðis sang natúran í morgun fyri tær, men tá ið komið varð suður um Áir, kom ein rípa av ljósi undan havsbrúnni aftantil á Nólsoynni og kemdi krállin á hesari gráhærdu oyggj við einum tættkambi. Bant hennara gráa hár upp í ein hviril og bað eina gráliga morgunbøn saman við hesari oyggj. Hon var so mjá um lendarnar og hevði ein so sera mjúkan barm, ið varð kíndur av tí lagliga veðrinum í morgunlýsinum.

Listaskálin

Komin til Havnar vórðu nøkur smáørindi gjørd, og so lá leiðin inn í Listaskálan at hyggja at listini hjá Ingálvi av Reyni. Illa tordi tú at trína inn í hendan halgidóm og hyggja at málningalistini hjá einum av okkara mætastu listafólkum. Eg mátti vaska bæði hendur og føtur, áðrenn trinið varð innum. Vaska alt tað gráa av mær og signa meg. Kroppurin skalv, sum eitt bókablað, og her var eingin at síggja inni í skálanum. Hvar vóru allir munkarnir? Jú, knappliga sá eg ein munk sita við listaliga kovan og fór at mæla. Eg hvakk við. – Góðan dag, Frits. – Ja, Jaaaaa, góðan dag! Eg neig djúpt fyri hesum landsins einasta munki hendan dag. Einsamallur millum øll hesi vældæmdu børnini hjá Ingálvi, ja tað skulu góðar nervar til at flyta seg frá talvu til talvu og fáa grátt og svart inn í eygnakrókarnar av oljurivnum penslastrokum úr hond Ingálvs. Hin einligi Munkurin, Oggi Lamhauge, tók meg í hondina og leiddi meg sum blindan mann inn í klivarnar. Eg blundaði, til eg kendi rødd Ingálvs, sum milt teskaði við ljósari barytonrødd. - Lat eyguni upp! So smátt um smátt rivaði fyri eygunum, og so við og við skilti tú álvarsemi í hesum, at tú vart komin inn í ein halgidóm, sum tú ikki hevði sæð makan til áður, hvørki her á landi ella nakra aðrastaðni á klótuni. Tær samantvinnaðu ræsurnar í málningunum komu leypandi ímóti tær í skarvslopum og tú mátti lata eyguni aftur, so hendan gonga ikki oyddi sjónina. Eg skilji væl, at vit báðir Oggi órógvaðu andaktina inni í hesum kliva, har málningarnir høvdu havt eina bønarstund og biðið fyri Ingálvi í ævinleikanum, har hann nú málaði Gráan morgun í himmalskum tónum.

Málningurin: Gráur morgun

Hesin ævinligi Grái morgun hekk so smæðin inni í bønarklivanum nr. 3. Hann rakk tann líðilanga veg av Bøvegi í Fuglafirði inn í Listaskálan í Havnini, og hekk har so viðkvæmur og smæðin. Hann hugdi at tær við sínum ingálviansku dreymsólju eygum og var komin eitt sindur til afturs í morgun eftir náttarinnar bønarstundum; men við eitt fór eitt bros um andlitið á honum, tí knappliga kom ein annar munkur inn í klivan, og tað var sonur sjálvan høvuðsprestin, Eyðun av Reyni. Málningurin, Gráur morgun fór at tala og umrøddi, hvussu torført, tað var at vera sum hundur í sama skinni og altíð at vera í gráum, men honum líkaði hetta, og mong vóru tey, ið elskaðu hetta... og kærleikin fjalir fjøld av syndum, eisini tær syndirnar, ið eru í gráum, svørtum og eitt sindur av reyðum.

" Satt er tað, tú Grái morgun!" Søgdu vit við ein munn í messandi tónum hendan dagin 4. des. 2009 í kliva nr. 3 í Listaskálanum. Hetta var ein dýrdardagur í gráum.

SOZOPRESS

P/F Fiskaaling søkir granskara

Søkt verður eftir granskara at arbeiða við framleiðslu av plantu- og djóraæti. Í samband við yngulframleiðslu av marinum fiskasløgum framleiðir Fiskaaling djóraæti í stórum sjógvhyljum á royndarstøðini í Nesvík. Í løtuni verður arbeitt við fáa betur innlit í framleiðsluna. Í hesum sambandi verður søkt eftir granskara at taka lut í hesum arbeiði.

Førleikar

- tú hevur viðkomandi útbúgving, universitetsútbúgving í lívfrøði ella líknandi
- tú hevur góð samstarvsevni
- tú ert nýhugsin og ágrýtin
- tú dugur at samskifta á enskum

Í verkætlanini verður arbeitt tætt saman við granskarum á Fiskaaling og á Havstovuni. Høvuðsaktiviteturin verður at standa fyri ætiframleiðslu í Nesvík, taka sýni og kanna hesi. Í samband við sýnini inngongur m.a. at eyðmerkja plantu- og djóraæti. Neyðug upplæring verður veitt til hetta arbeiði. Góður møguleiki er fyri framhaldandi granskingarstarvi. Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Øystein Patursson á tlf 214787 ella Ingolf Joensen á tlf 214747.

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skal sendast til:

P/F Fiskaaling
Við Áir
FO-430 Hvalvík

ella

fiskaaling@fiskaaling.fo

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 11. januar 2010. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er umleið 20, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo

Havstovan í fíggjarlógini

HJALTI Í JÁKUPSSTOVU

Havstovan er í fíggjarlógunum fyri 2009 og 2010 skorin við ialt 1,3 mill. kr. Í fíggjarlógini fyri 2010 er heldur einki játtað til nýtt havrannsóknarskip

Undir viðgerðini av fíggjarlógini fyri 2010 var í Løgtinginum fört fram, at einasti vegur burtur úr tí óføri Føroyar eru komnar í, er at vaksa um inntøkurnar. Ein máti var at økja um partin hjá Føroyum av pelagisku fiskastovnunum makreli, sild og svartkjafti. Landsstýrið vil eisini at Havstovan leggur fram argument, ið kann grundgeva fyri føroysku krøvunum. Fyri at Havstovan kann gera hetta, má hon hava amboð at arbeiða við, bæði fólk og skip við útgerð til endamálið. Hetta sæst ikki aftur í fíggjarlógini fyri 2010, men beint tvørtur í móti.

Í nógv ár hevur Havstovan vístá, at veiðitrýstið undir Føroyum er ov høgt, og at hetta fór at hava fíggjarligar avleiðingar. Hetta sæst í ólukkumát nú bæði lítið hevur verið at fáa, og prísurin er vánaligur.

Føroysk fiskivinna vil fegin verða MSC góðkend sum ein skilagóð og burðardygg vinna. Hetta gera vit bara við sakligum og vísindaliga grundaðum argumentum, og ikki við at trútta ella siga, at vit vistu ikki betur.

Eftir mínum tykki er tað sera vandamikið fyri føroyska fiskivinnu at minka um játtanina til Havstovuna og at seta út byggingina av einum havrannsóknarskipi. Fiskivinnan er og verður í nógv ár høvuðsvinnan í Føroyum, og hon hevur góða gransking fyri neyðini. So, heldur enn at minka játtanina til Havstovuni, eigur hon at vaksa við í minsta lagið 1,3 mill kr., og farast má skjótast gjørligt undir at byggja nýtt havrannsóknarskip.